Bilarnir í "Kringvarpsgarasjuni":

# Rodius og Grand Cherokee


Bilarnir í "Bylgjuni" í Kringvarpi Føroya mikudagin vóru Ssangyong Rodius 2,7 XDI og Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD

**Bilarnir, sum vórðu umrøddir í úrvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin 9. mai, vóru Jeep Grand Cherokee og Ssangyong Rodius**

BILAR

Í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin vóru tveir bilar umrøddir. Talan var um Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD, er ein luksus SUV (Sport Utility Vehicle), og Ssangyong Rodius, ið er ein stórur MPV (Multi Purpose Vehicle) við plássi til sjey ferðandi við viðføri.

Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD er ein luksus SUV (Sport Utility Vehicle) við allari hugsandi útgerð.

Bilurin, ið varð royndarkoyrdur, hevði 3,0 litra V6 turbodiesel við commonrail innspræning og 218 hk. Motorurin er ljóðleysur, kraftar væl og er sera kvikur.

Grand Cherokee fæst eisini við tveimum V8 motorum upp á ávikavist 4,7 g 5,7 litrar.

Grand Cherokee hevur Quadra-Drive II skipan, sum alla tíðina syrgir fyri, at rætta drívmegin er, har hon skal vera. Grand Cherokee orkar væl at sleipa og er væl egnaður til t.d. anhangara og til hestatransport.

Bilurin, sum var royndarkoyrdur, var ein Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD, ið kostar kr.640.000. Í bíligastu útgávuni kostar Jeep Grand Cherokee kr. 522.000 og 393.000 sum Van hjá Ivan Johansen Bilum.

Ssangyong Rodius er ein av størstu MPV (Multi Purpose Vehicle) á marknaðinum. Bilurin er yvir fimm metrar langur og vigar yvir tvey tons.

Motorurin er ein 5 syl. dieselmotor på 2,7 liters med 165 hk og 342 Nm. Motorurin og automatgirkassin eru frá Mercedes-Benz.

Innrættingin er sera liðilig, t.d. kunnu setrini í miðjuni snarast 180 stig, so tey venda ímóti teimum á aftasta rað.

Hóast øll 7 setrini eru í brúk, er viðførisrúmið stórt (875 litrar). Við øllum setrunum niðri hevur Rodius eitt vørurúm upp á yvir 3.000 litrar. Bilurin, sum var royndarkoyrdur, var ein Ssangyong Rodius Spirit Aut. 4x4 kostar kr. 386.431. Bíligasti SsangYong Rodius XDI Freedom kostar kr. 319.258 hjá Bilverkstaðnum v.H.J. Kollsker á Hjalla.

Tað var útvarpsmaðurin Kári Sólstein, sum tosaði við Sofus Hansen, bilbyggjara, og Óla Jákup Rólantsson og Magnus Gunnarsson, sum skriva um bilar í ávikavist Vikublaðnum og Sosialinum.

**mg.**







Ssang Rodius






Jeep Cherokee



Jeep Cherokee og Ssangyong Rodius


## Ellisakfar til sølu

**Volvo 144 sedan, árg. 1971.**
Bilurin varð høvuðsumvældur í 1994 og er í góðum standi. Bert tveir eigarar, einans koyrt 85.000 km.



**Tel. 282805**





## VW Golf mest seldi bilur í Evropa

**Tíggju teir mest seldu bilarnir í Europa 2006**

| | | | |
|---|---|---|---|
| · Volkswagen Golf: | 545.608 | · Ford Fiesta: | 353.644 |
| · Opel Astra: | 452.749 | · Volkswagen Passat: | 331.801 |
| · Peugeot 207/206: | 443.780 | · Peugeot 306/307: | 306.448 |
| · Renault Clio: | 431.702 | · Volkswagen Polo: | 294.993 |
| · Ford Focus: | 418.300 | | |
| · Fiat Grande Punto/ Punto: | 400.996 | | |

Kelda: Automotive News Europe